**Sørvágs Kommuna**
**FO-380 Sørvág**

# Kunningarskriv 2003

**Góðu sørvingar**

Àrið 2003 verður nú lagt aftur um bak, sólin handan fjallið togar seg um fáar dagar upp um fjallarøðina, og dagur tekur at togna. Eg fari, sum undanfarin ár, í stuttum at greiða bygdafólki okkara frá, hvat bygdarráðið hevur arbeitt við tað seinasta árið, og hvat ætlanin er við komandi og seinasta árinum hjá sitandi bygdarráði.

## Fíggjarætlanin

Bygdarráðið hevur havt 14 fundir í hesum árinum, og hevur viðgjørt umleið 130 mál.
Fíggjarætlanin fyri 2004 var til triðju viðgerð á fundi 26.11.03, og var hon endaliga samtykt.
Metta skattskylduga inntøkan er 133.440.700 kr, ein vøkstur upp á góð 5% sammet við fíggjarætlanina fyri 2003.
Skattaprosentið verður óbroytt 19,75% , men barnafrádrátturin verður hækkaður frá 2.500 til 3.000 kr.
Hetta eru ikki stórir lættar vit geva, men tað gongur tó tann rætta vegin. Ein sannroynd er, at føroyski búskapurin hevur nátt hæddirnar, og eiga vit tí at vera varin. Tær stóru íløgurnar eiga at raðfestast 3-4 ár fram í tíðina.

## Roknskapurin

Grannskoðaði roknskapurin fyri árið 2002 varð framlagdur og góðkendur á fundi 30.05.03.
Àrsrokniskapurin vísir ein javnvág uppá 26.075.408 kr. Eina fíggjarstøðu, sum javnvigar við 13.606.843 kr. Ì fíggjarætlanini fyri 2002 varð roknað við einum halli uppá 466.087 kr aftaná avdráttir, men vísir roknskapurin eitt yvirskot upp á 869.966 kr aftaná avdráttir.
Skuldin hjá kommununi, sum var ein tyngjandi partur fyri nøkrum árum síðan, er tann 31.12.03 komin niður á 5.061.000 kr.

## Fólkatalið

Fólkatalið í bygdini er nakað vaksið í farna árið. Við árslok 2002 vóru 963 fólk í bygdini, meðan vit í dag búleikast 976 í kommununi.

Hesin vøkstur uppá 13 fólk ella 1,4% er í minna lagi, tá hugsað verður um, at hin 10. desember 2003 var eitt ár liðið síðan fasta sambandið um Vestmannasund var veruleiki.

Hvørjar eru so orsøkirnar til, at vøksturin í Vágum ikki er størri? Tær kunnu vera ymiskar. So leingi tað er vøkstur, kunnu vit fegnast, men eingin yvi er um, at ein av orsøkunum til at vøksturin ikki er størri, er kostnaðurin um Vestmannasund.

Fyri vágafólk, sum arbeiða í miðstaðarøkinum, -ella øvugt-, er ein samanbering gjørd, sum vísir munin, um tú býrt í Leynum ella Sandavági, tað vil siga báðumegin við tunnilsmunnan. Fyri vágafólk, sum brúka egnan bil hvønn dag, tá allar útreiðslur og frádráttir eru tiknir við, er kostnaðurin uml. 20.000 kr um árið. Fyri íbúgvarnar í Leynum ella Kvívík er kostnaðurin 1.535 kr um árið. So her má sigast, at tunnilin ikki tænir sínum endamáli í nóg stóran mun. Fyri vinnulívið er kostnaðurin eisini kappingaravlagandi, so okkara minsta krav er at virka á jøvnum føti við tey, sum kappast verður ímóti.

Bústaðarmøguleikar er ein stórur trupulleiki, ikki bert í Sørvági, men í allari oynni. Hóast fleiri nýggj hús eru bygd í ár, er eftirspurningurin rættuliga stórur eftir onkrum at búgva í. Sum undanfarin ár vil kommunan heita á fólk, sum hava tóm hús standandi, at hugsa um tey, sum einki hava at búgva í.

**Teknisk mál**
Teknisk mál eru nógv tey flestu í kommunalpoltikki. Sitandi bygdarráð setti sær fyri at gera tey arbeiði liðug, sum tað var byrjað uppá, men sum ikki vóru liðug orsaka av teimum vánaligu tíðunum, sum vóru í nítiárunum.
Rættuliga nógv av peningi er brúktur í ár til at betra um teir kommunalu vegirnar. Hettar eru fólk fegin um, men ikki øll eru nøgd, og nøkur eru enn sum eru sera ónøgd. Soleiðis vil tað altíð verða, tey sum standa aftarlaga í einari ætlan vilja vera ónøgd. Men komandi ár haldi vit fram at betra um hesi viðurskifti.

**Dagtilboð og umlætting**
Ì seinasta kunningarskrivi varð upplýst, at kommunan hevði keypt húsini hjá Eli Joensen sála, frá Jákup og Jóan Paula Joensen, og at hesi skuldu umbyggjast og brúkast til dagtilboð og umlætting.
Hettar arbeiði er komið val áleiðis. Ætlanin er at húsið verður tikið í brúk umleið hálvan februar. Sørvágs kommuna hevur gjørt leigusáttmála við serforsorgina um leigu av teimum 320 kvm fyri eitt ávíst krónutal pr. fermetur. Kostnaðurin fyri bygningin fer at liggja millum 2,3-3 mill krónur. Við hesum snotiliga bygningi fáa tey, sum ikki rópa harðast í okkara samfelag, góðar umstøður at virka undir. Àrið 2003 er lýst ár teirra brekaðu.



**Byggisamtyktin**
Ì seinasta kunningarskrivunum varð nevnt, at kommunan arbeiddi við broytingum í byggisamtyktini. Upplýst varð, at hettar er eitt sera drúgt arbeiði, og kunnu vit bert staðfesta, at so er. Á fundi 23.06.03 varð byggisamtyktin endaliga samtykt. Góðkenningin er ikki komin uppá pláss enn. Býarskipanarnevndin hevur gjørt sínar viðmerkingar til uppskotið, og hevur sent málið til Oljumálastýrið, sum skal góðkenna ætlanina.

Fyri 3 vikum síðan varð rykt eftir svari. Kommunan fekk munnliga at vita úr Oljumálaráðnum, at málið fór at verða avgreitt í hesum árinum, men so er ikki. Vónandi ganga ikki nógvir dagar í tí nýggja árinum, til hetta er komið upp á pláss, serliga tá hugsað verður um, at kommunan arbeiðir við tekniskum málum, sum eru treytað av góðkenning av nýggju byggisamtyktini.

Hvørjar eru so ætlanirnar í komandi ári? Á fíggjarætlanini fyri 2004, sum er tann seinasta í hesari setuni sum sitandi bygdaráð arbeiðir við, eru íløgur fyri 6,5 mill. krónur. Til barnagarðin, sum verður ein krevjandi íløga, eru avsettar 2,5 mill. krónur. Keyp av lendi 1 mill kr. Nýgerð Sørvágs havn 550 túsund kr. Vegurin út á Pall 400 túsund kr., umframt ymsar smærri játtanir fyri 1,5 mill kr. Afturat hesum er tekniskt viðlíkahald í rakstrinum.

**Bygdaráðsfundur í 2004**
22.01.04 – 18.02.04 – 16.03.04 – 19.04.04 – 11.05.04 – 23.06.04 – 26.08.04 – 16.09.04 – 04.10.04 – 08.11.04 – 15.12.04 Allir fundir byrja kl.19.00. Verða eykafundir ella fundir útsettir, verða hesir lýstir í svørtutalvu. Alt hetta fáa tit eisini upplýsingar um á nýggju heimasíðuni, sum vantandi verður løgd á netið í januar mánaða.

**Nýggjur Barnagarður**
Ì komandi ári verður farið undir at byggja nýggjan barnagarð. Ætlanin er, at hesin skal liggja uppi á Mýrum. S/Pf Westtec hevur gjørt eitt skitsuprojekt av bygninginum, sum kemur at rúma uml. 100 børnum við 6 stovum. Hettar er ein stór og krevjandi íløga.



Eingin endalig kostnaðarmeting er gjørd av byggingini, men ein meting uppá 9 mill. Kr, er ikki langt við síðuna av. Byggingin verður yvir 2 fíggjarár, og ætlanin er, at hann skal standa liðugur á heysti 2005. Hettar er sjálvandi treytað av, at arbeiðið byrjar til várs.

Núverandi barnagarður verður frá 01.01.04 uppnormeraður frá 25 til 31 børn.
Dagrøktin er eisini uppnormerað í ár frá 30 til 35 børn, so her má sigast, at tað grør um gangandi fót.

**Frítíðarskúli**
Frá 15.januar 04 er ætlanin at byrja við frítiðarskúla fyri børn upp til 3 flokk eftir skúlatíð.
Hettar verður gjørt í húsinum hjá Sørvágs Ítróttarfelag.
Frítíðarskúlin verður partur av verandi ansingarskipan.

**Vága Floghavn**
Størsta arbeiðsplássið í Vágum, Vága Floghavn, sum hevur verið nógv umrødd í farna ári í samband við yvirtøku og útbygging, er komið á eitt vegamót.

Leiðslan á Vága Floghavn hevur seinasta árið arbeitt við einari útbyggingarætlan fyri økið. Henda framtíðarætlanin leggur upp til, at økir verða avløgd til flogvallar-endamál. Ùbyggingarætlanini lýsir tørvin, bæði fyri tann ferðandi, flogfeløg og æðra tænastur, sum eru tilhoyrandi økið, og ikki minst hølisviðurskifti. Tann ósvaraði spurningur, sum enn hongur í leysum lofti er*, hvør skal gera hvat*.

Tørvurin, sum hann verður lýstur umfatar:

Krøv um økta trygd.
Ynski frá ferðandi, um betri tænastu.
Økta bilferðslan í samband við tunnilin.
Ùtlit fyri framtíðarflúgving.
Vaksandi tørvur fyri leinging av vøllinum.
Ein møgulig oljuvinna

Tað er Skaarup & Jespersen saman við Arkitektavirkinum hjá Àrna Winther, sum hava gjørt uppskotið.

Alt hettar fara vit at hoyra meira um í komandi árið.

**Havnarøkið**
Síðan kreppuárini hevur havnarøkið verið í støðugari menning, Vestís-Seafood hevur arbeitt ca 1.360 tons í farna ári. Landingarmiðstøðin, sum ætlanin skuldi flyta í nýggj hølir í ár, hevur tikið ímóti ca. 3.500 tonsum. Her hevur mótgangur verið, sum ikki stendur í okkara makt. Fyrst í komandi árið verður bygningurin, sum er keyptur frá Handilsvirkinum Niclasen, liðugt umvældur og klárur at taka í nýtslu. Hettar kemur vónandi at menna aðra vinnu eisini, so sum handverk og tænastuvinnur. Vantandi koma eini 6-7000 tons av fiski upp á land í komandi ári.

Hvat fiskiflotanum viðvíkur, hevur tað verið ein frøi at síggja okkara fiskiflota um høgtíðina strekt allar teir 328 metrarnar av atløgubryggju.
Ì ár eru tvey skip komin til bygdina afturat, P/F Rávan, -(Vesturvón)-, sum eigur Dragasund og Akranes, hevur keypt tveir ísfiskatrolarar, Polarhav og Stjørnuna, sum hava skift navn til Vesturleika og Vesturroðin.
Àrið í ár hjá feskfiskaflotanum undir Føroyum hevur ikki hepnast so val hjá øllum. Hettar kemst av vánaligum prísi á fleiri fiskasløgum.

Ì heyst hoyrdu vit at eisini Sørvágs laks hevði fingið ILA í ein av sínum ringum, men eftir nærri kanningum vóru hesi tíðindi avsannað. Hettar vóru gleðilig tíðindi, tá hugsað verður um, hvussu vánalig útlitini fyri alivinnuna hava verið, fyrst við vánaligum prísi og ikki minst við ILA sjúkuni, sum er staðfest á flest økjum í Føroyum. Ùtlit eru fyri, at prísirnir fara at hækka í komandi árið og vantandi fer Sørvágs laks at slakta ímillum 3 – 3.500 tons í komandi ár. Hvat verður sett út komandi summar, er ikki til at siga í skrivandi løtu, alt velst um prísin.

Nakað er gjørt fyri at betra um sjálva bryggjuna, frárensl, vatn og ristir eru løgd av nýggjum, eisini er eru stórir partar av kaiøkinum asfalteraðir. Ikki allir vinnubólkar, sum halda til á havnarøkinum, hava nøktandi umstøður, so vónandi verður nakað gjørt við hettar.

Síðan yvirgangsatsóknina 11. september 2001 er heimurin nógv broyttur, heimurin er ikki eitt tryggari stað at verða í fyri øll. Trygdarkrøv bæði í luftini og á landjørðini eru herd, hesi krøv umfata nú eisini havnarøkið.

Allar havnir, sum fáa vitjan av skipum omanfyri 500 B.T og ferðamannaskipum í altjóða sigling, skulu hava eina IMO góðkenning (International Maritime Organisation). Her verða allar tær góðkendu havnirnar skrásettar í einari databasu. Har skulu havnirnar standa í, um tær fáa vitjan av skipum omanfyri 500 B.T og ferðamannaskipum.

At samstarvsavtala nú verður gjørd, er eitt tekin um álvaran í hesum máli.
Avtalan umfatar

Váðameting av havnini
Havnarverndarætlan ella PFSP ( Port Facility Security Plan)
Ìverksetan
Góðkenning av avvarðandi myndugleika.

Tað er Sp/F Navit við Lassa Borðoy, sum bindur seg til at hjálpa og ráðgeva til góðkenningin er í lagi seinast 1.juli 2004.

**Gøtunøvn**
Fyrst í komandi ári fær hvørt húski skriv frá kommununi við nummari og gøtunavni. Ein nevnd mannað við Suna Jacobsen, Regin Jespersen, Herálv Jacobsen, Høgna Nielsen og Sonna Jacobsen hava gjørt uppskot til gøtunøvn, sum kommunan hevur góðkent. Hettar, at seta navn á gøtur, kunnu øll hava fleiri meiningar um. Serliga tá hugsa verður um, at eitt stað ímillum 8-900 nøvn og staðarnøvn hava verið tilhoyrandi markatalsbygdini Sørvág. Tíðarinnar tonn og menningin av bygdini hava fjalt nøkur av hesum. Samanumtikið vælvald nøvn.

**Seyðurin av bønum**
Eitt ynski, sum flest allir borgarar hava, er at fáa seyðin út úr bygdum øki. Hettar hevur kommunan arbeitt við saman við hagapørtunum Norðurtriðingi, Vørufelli og Ùttriðingi. Ytri Suðurtriðingur valdi ikki at verða við í arbeiðinum. Eitt uppskot um endurgjald fyri mist vetrarbit saman við einari linjuføring av einum nýggjum hegni, verður lagt fyri hagafundirnar, sum eru í januar/februar. Hvat víðari kemur at henda veldst um niðurstøðuna hjá hagapørtunum.

**Kommunusamanlegging**
Hetta seinasta árið hava nakrar av teim smærru kommununum við fólkaatkvøðu avgjørt at leggja saman við einari størri kommunu. Hesin spurningur er eisini komin til okkara. Sørvágs–Býggjar/Gásadals kommuna hava havt samráðingar um samanlegging. Tá hesar bygdir samstarva á fleiri økjum, vil hesin spurningur vera sjálvsagdur, serliga tá hugsað verður um tær uppgávur, sum skulu áleggjast kommununum. Kommunurnar arbeiða við at fyrireika kunningartilfar, sum borgararnir í Bø og Gásadali fáa útflýggjað ella verða kunnaðir um á einum borgarafundi, áðrenn fólkaatkvøðan verður. Tað er týdningarmikið, at ynski kemur frá fólkinum sjálvum, og at fólkini eru væl og virðiliga kunnað við ta nýggju skipanina, sum stendur teimum í boði. Bert Bíggjar og Gásadals fólk avgera hettar - valið er teirra.

**Framtíðarútlit**
Hvussu framtíðarútlitini verða fyri samfelag okkara, eru tað fleiri, sum geva eitt boð uppá á ársins síðsta degi. Vitandi um, at samfelagi hevur verið í stórari menning tey seinastu árini, eru tekin um, at vinnuøkið í komandi ári ikki hava somu umstøður at virka undir, sum undanfarin ár. Hesi viðurskifti vilja altíð verða í einumhvørjum samfelag, og serliga hjá teimum, sum hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu.

At stígur er komin í búskapin, krevur umhugsni bæði lands- og kommunalpolitiskt. Við tað er ikki sagt, at hettar ikki verður eitt gott land at liva í. Bygd/oyggj okkara hevur eitt ríkt vinnulív, bæði á sjógvi og landi. Allar avgerðir eiga at verða tiknar við umhugsni.
Um nakrar vikur skulu vit aftur til valborðið. Hettar er okkara demokratiski rættur at hava eitt boð upp á okkara framtíð. Mistreysti og dapurskygni um okkara framtíð, sum altíð vil verða ókend, er ein niðurbrótandi og illa umhugsaður boðskapur.
Hettar er mítt land - hettar er okkara land, verður sungið. Her rakar sangkvinnan Emma ein kenslu í okkum øllum, sum eingin kann taka sær rættin at hava besta boði uppá.

Tíðin titar, skeið er skamt, glasið rennur javnt og samt, soleiðis verður yrkt. Jól og nýggjár, sum eru gleðihátíð, hava samlað okkum saman við okkara kæru. Ikki øllum untist hesa hátíð, árið sum farið er, hevur savnað og skylt og vit drýpa høgur saman við teimum, sum hava mist.

Eg fari til seinast at ynskja øllum eitt av Harranum vælsignað nýggjár, við ynski um eina bjarta framtíð. Øll tit, sum á hvørjum ári gera jól og nýggjár hugnalig við tykkara tiltøkum, skulu hava eina hjartans tøkk. Gott Nýggjár øll somul.

Sørvágur 30.desember 2003

Vinaliga

**Sørvágs Kommuna**

Eivin H Jacobsen, borgarstjóri

| Sørvágs Kommuna | Roknskap 1999 | Roknskap 2000 | Roknskap 2001 | Roknskap 2002 | Bókað 11.09.03 2003 | Fíggjarætlan 2004 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattskydug inntøka: | 90.500.000 | 93.700.000 | 100.093.600 | 85.004.000 | 126.533.100 | 133.440.700 |
| Skattaprosent: | 21,25% | 21,25% | 20,50% | 20,00% | 19,75% | 19,75% |
| Barnafrádráttur: | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 3.000 |
| Kirkjuskattur: | 0,25% | 0,25% | 0,00% | 0,00% | 0,00% | 0,00% |
| **RAKSTUR:** | | | | | | |
| 1000. Byggibúning | 74.628 | 48.460 | 85.834 | 58.677 | 31.821 | 31.150 |
| 2000. Kommunal virkir | 848.827 | 192.340 | 138.913 | 808.200 | 508.426 | 414.621 |
| 3000. Teknisk mál | 2.510.506 | 2.678.855 | 4.334.075 | 3.157.858 | 1.636.296 | 3.609.850 |
| 4000. Skúla- og mentunarmál | 2.190.179 | 2.228.153 | 2.358.959 | 2.764.785 | 1.497.243 | 2.742.920 |
| 5000. Almanna- og heilsumál | 2.912.921 | 2.174.337 | 2.923.133 | 3.027.184 | 1.969.805 | 4.451.657 |
| 6000. Kommunala fyrisitingin | 1.876.146 | 1.682.269 | 2.052.899 | 2.153.322 | 1.742.347 | 2.296.933 |
| 860630. Rentustuðul til landið | 468.614 | 593.271 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **A. RAKSTUR SAMANLAGT** | **10.881.820** | **9.597.685** | **11.893.812** | **11.970.026** | **7.385.939** | **13.547.131** |
| **ÍLØGUR:** | | | | | | |
| 1000. Byggibúning | 337.137 | 93.602 | 191.079 | 653.419 | 106.586 | 1.500.000 |
| 2000. Kommunal virkir | 654.252 | 671.667 | 473.714 | 335.604 | 90.904 | 960.000 |
| 3000. Teknisk mál | 2.069.999 | 2.088.488 | 1.152.022 | 1.816.593 | 1.904.483 | 1.255.200 |
| 4000. Skúla- og mentunarmál | 123.346 | 52.758 | 359.200 | 565.107 | 624.723 | 274.200 |
| 5000. Almanna- og heilsumál | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2.500.000 |
| 6000. Kommunala fyrisitingin | 0 | 0 | 90.408 | 137.395 | 224.435 | 90.000 |
| **B. ÍLØGUR SAMANLAGT** | **3.184.734** | **2.906.515** | **2.266.423** | **3.508.118** | **2.951.132** | **6.579.400** |
| **RAKSTUR & ÍLØGUR** | **14.066.554** | **12.504.200** | **14.160.235** | **15.478.144** | **10.337.071** | **20.126.531** |
| Rentuútreiðslur: | 1.231.788 | 1.304.065 | 833.594 | 518.427 | 150.596 | 119.000 |
| Rentuinntøkur: | -375.097 | -382.760 | -259.971 | -284.760 | -120.961 | -284.137 |
| **C. RENTUR** | **856.691** | **921.305** | **573.623** | **233.667** | **29.635** | **-165.137** |
| **Avskr. Lán Barnagarðurin:** | | **1.045.826** | | | | |
| **FÍGGJARBROYTINGAR:** | | | | | | |
| Reg. Kreppugr. & Vágatunnilin | 0 | 497.409 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kreppulánsgrunnur | 0 | -1.708.418 | -108.569 | -31.200 | -27.024 | 0 |
| Øking av likvidum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Aðrar fíggjarbroytingar | 388.695 | 2.056.555 | -313.776 | -987.470 | 1.743.644 | -1.532.860 |
| **D. FÍGGJARBROYTINGAR** | **388.695** | **845.546** | **-422.345** | **-1.018.670** | **1.716.620** | **-1.532.860** |
| Avdráttur | 2.278.285 | 6.201.648 | 2.471.052 | 4.798.682 | 1.509.735 | 3.200.000 |
| Eykaavdráttur | 2.000.000 | 2.000.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **E. AVDRÁTTUR AV LÁNUM:** | **4.278.285** | **8.201.648** | **2.471.052** | **4.798.682** | **1.509.735** | **3.200.000** |
| **ÚTREIÐSLUR SAMANLAGT:** | **19.590.225** | **23.518.524** | **16.782.565** | **19.491.823** | **13.593.060** | **21.628.534** |
| **INNTØKUR:** | | | | | | |
| Hall at fíggja | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Lántøka | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Minking av likvidum | -990.574 | -2.633.669 | 2.837.764 | 1.855.095 | -1.596.476 | 1.541.790 |
| Avdráttur av útlánum | -494.242 | -1.074.989 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Aðrar fíggjarbroytingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Skattainntøka (netto) | -18.105.410 | -19.809.867 | -19.620.312 | -21.346.917 | -11.996.584 | -23.170.324 |
| **F. FÍGGJAN SAMANLAGT** | **-19.590.225** | **-23.518.525** | **-16.782.548** | **-19.491.822** | **-13.593.059** | **-21.628.534** |
| Javnvág | 0 | -1 | 17 | **1** | **0** | **0** |
| **ÚRSLIT áðrenn avdrátt:** | **-3.182.165** | **-5.338.536** | **-4.886.454** | **-5.635.106** | **-1.629.878** | **-3.208.930** |